Søljan-Kyndil 20-16 (15-6):

# Søljan rann úr botninum

**Við greiðari spæliætlan og góðari disciplin eydnaðist Søljuni í fyrra hálvleiki at taka allan spenningin úr botnuppgerðini**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Søljan er ikki longur botnlið í bestu kvinnudeildini. Hesum syrgdu tær fyri, tá tær á heimavølli tóku alt í botnslagnum móti Kyndli, sum nú er einsamalt eftir á niðasta sessinum.

**Køvdu spenningin**

Frá flestu síðum mundi verða roknað við eini sera spennandi uppgerð, har bæði vóru mest sum kroyst til at vinna. Kanska einamest Kyndil, sum upp í gjøgnum 90'ini veruliga var við til at mynda føroyska hondbóltsoddin, men sum seinnu árini er dottið alt meira burturímillum. Og sum nú altso stendur við eini veruligari hóttan um aðrudeildarhondbólt komandi kappingarár.

Men tað var tó so sum so við spenninginum. Søljan syrgdi nevnliga hampuliga skjótt – og við einfaldum midlum – fyri, at rúmur sjógvur varð lagdur ímillum liðini. Spæliætlanin var púrasta greið. Tær lótu Kyndil koma móti verjuni, har tær so royndu at halda teimum burtur frá teimum heilt leysu skotroyndunum. Úrslitið varð aloftast, at Kyndils-leikararnir máttu royna seg útifrá, og so skjótt skotið varð latið av, spurtaði ein av gulu søljunum fram. Í Kristinu Griksaite hevur Søljan ein málverja, sum bæði kann bjarga og kasta langt, og tá gestirnir hvørki tóktist hava hug ella orku at renna við fullari ferð heim, so mátti tað ganga galið.

Somikið mið- og einvís var hendan satsanin hjá Søljuni, at tað fyri Kyndil ivaleyst hevði verið skilagott, um tær høvdu gjørt sum fótbóltslið, ið skulu styrkja verjuna. Nevnliga spælt við einum sweepara, sum so kundi samlað upp, tá bóltar vórðu tveittir fram.

Og sum hálvleikurin leið, so fór málmunuriin eisini at merkja sálarligu støðuna hjá liðunum báðum. Spælið hjá Kyndli gjørdist alt meira mótleyst, og uttan nakran stórvegis brodd fekk heimaliðið alsamt víðari ræsur til sítt spæl. Hóast fleiri útkøst ikki vóru nóg neyv, tí Kristina alla tíðina skundaði tær somikið nógv, so góvu fleiri teirra eisini úrslit, og neyðars Fríða Petersen í Kyndils-málinum fekk ikki gjørt stórvegis fyri halda muninum niðri.

At Søljan hevði nýtt nógva orku í støðugu spurtunum fram eftir vøllinum fyri steðgin gjørdist skjótt greitt, tá liðini komu útaftur. Framvegis tóktist ætlanin vera á leið tann sama. Tó at hon nú ikki var heilt so einvís.

Hinvegin var ikki longur sama ferðin í beinunum á leikarunum, og seinasta korterið ella so birtist ein lítil vón hjá Kyndli. Søljan fekk hesa løtuna bert tvey mál, og sum minuttirnir liðu gjørdist spælið alt meira fjáltursssturngið. Óttin fyri at tað kortini skuldi eydnast Kyndli at fáa okkurt burturúr vaks støðugt í høvdunum á leikarunum, og saman við møðini viðførdi hetta alt meira mistøk í spælinum.

Fyri áskoðararnar mundi óttin tó ikki kennast heilt so stórur. Minuttirnir tikkaðu støðugt avstað á klokkuni, og tó at Kyndil fekk minkað munin í trý mál, so vóru tá bert hálvur annar minuttir eftir, og tað var ikki nóg mikið. Søljan megnaði eisini móti endanum at skjóta enn eitt mál, og so var frøi á gentunum. Løtu seinni blástu dómararnir fyri seinastu ferð, og so var tað greitt. Søljan hevur í fyrstu atløgu skrykt seg úr botninum, og umframt týdningin á stigatalvuni, so mundi tað sálarliga eisini kennast sum eitt stórt skump hjá liðnum.

Hjá Kyndli er støðan hinvegin einki serlig í løtuni. Sum nevnt, so hevur liðið seinasta tíggju-ára skeiðið vunnið sær nakrar stoltar traditiónir, men hesar hjálpa tó lítið í verandi støðu. Stóri trupulleikin hjá liðnum tykist vera, at har er eingin leikari, sum einsamøll kann lyfta liðið, tá mest stendur á. Ætlaði útlendski styrkurin varð av ongum í ár, og tó at Lotte Sørensen nú var aftur at síggja á liðnum, so krevur hon helst nakað av tíð, áðrenn hon av álvara er komin fyri seg eftir drúgva skaðasteðgin.

Miðvísa ungdómsarbeiðið í felagnum hevur tó viðført, at tað eru fleiri leikarar, sum í framtíðini kunnu gera nógv um seg, og tí er tað helst eyka keðiligt fyri felagið, at støðan í løtuni er tann, at liðið liggur til eina framtíð í næstbestu deildini.



*Hóast Kyndil í seinna hálvleiki royndi at stríðast, so megnaðu tær ikki at vinna tað aftur, sum tær mistu fyri steðgin*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Neistin-KÍF 38-25 (17-12):

# Skrædnaði eftir steðgin

**Tá Neistin í seinna hálvleiki setti ferðina upp, megnaði KÍF als ikki at fylgja við longur**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Mikukvøldið varð útsetti dysturin millum Neistan og KÍF leiktur. Sum tølini siga, so endaði alt við einum knúsandi tryggum heimasigri, men leingi var tó als ikki líkt til, at munurin skuldi gerast somikið stórur.

Fyrsta góða korterið ella so fylgdust liðini sera væl, men seinastu løtuna undan steðginum fekk KÍF tó ikki fylgt við. Serstakliga dugdi Blagoje Buha væl at skapa trupulleikar fyri KÍF verjuna, og i seinna hálvleiki var skjótt greitt, at hann nú var um at gerast rættiliga heitur. Kollfirðingar vórðu alt fyri eitt settir undir stórt trýst, og á máltalvuni bara vaks munurin. Um miðjan seinna hálvleik fór tað at líkjast veruligum sorli, tá Neistin skoraði heilar seks ferðir á rað, men so varð ferðin tó sett nakað niður, soleiðis at kollfirðingar hóast alt fingu pyntað nakað um, tó at talan á ongan hátt gjørdist um nakað heiðurligt úrslit.

Og við sigrinum fekk Neistin helst staðfest, at teir so avgjørt ætla at gera nógv um seg í oddinum í ár. Saman við grannunum úr Kyndli eru teir á odda í deildini, og so er spurningurin, hvørt teir eisini megna at halda fast um hesa støðu. Komandi dysturin verður nevnliga ímóti meistarunum úr StÍF, og teir hava so ikki ráð at missa nakað, um teir framhaldandi skulu halda fast í oddinum. Kollfirðingar skulu tá spæla móti VÍF, og tó at vestmenningar hava sítt at stríðast við, so kann tann dysturin undir ongum umstøðum roknast sum ein av teimum løttu.

**Dysturin í tølum**

**Neistin-KIF 38-25 (17-12)**
**Málskjúttar**
**Neistin:** Dragisa Stojovic 11(1), Blagoje Buha 10, Áki Mørk 5, Ragnar Stakksund 3, Helgi Michelsen 3, Helgi Justinusen 2, Finnur Petersen 1, Ári Rouch 1, Birgir Kass 1, Karl Oddmar Rasmussen 1
**KÍF:** Damir Oros 6, Gert Hansen 5, Petur Martin Poulsen 4, Jónálvur Johannesen 3, Mirko Milenkovic 2, Regin Petersen 2, Sune Davidsen 2(2), Hallur Hansen 1
**Brotskøst:** Neistin 1, KÍF 2
**Útvísingar:** Neistin 2, KÍF 1
**Dómarar úr H71:** Jákup Símun Simonsen & Høgni M. Joensen

## Hondbóltsstøður

**1. Deild kvinnur**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VÍF | 6 | 5 | - | 0 | - | 1 | 154 | 127 | 27 | 10 |
| 2 Stjørnan | 6 | 4 | - | 1 | - | 1 | 155 | 118 | 37 | 9 |
| 3 VB | 6 | 4 | - | 0 | - | 2 | 144 | 112 | 32 | 8 |
| 4 StÍF | 5 | 3 | - | 1 | - | 1 | 119 | 112 | 7 | 7 |
| 5 Neistin | 5 | 2 | - | 0 | - | 3 | 134 | 112 | 22 | 4 |
| 6 Søljan | 6 | 1 | - | 0 | - | 5 | 106 | 154 | -48 | 2 |
| 7 Kyndil | 6 | 0 | - | 0 | - | 6 | 84 | 161 | -77 | 0 |

**1. Deild menn**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Neistin | 4 | 3 | - | 1 | - | 0 | 126 | 101 | 25 | 7 |
| 2 Kyndil | 4 | 3 | - | 1 | - | 0 | 116 | 109 | 7 | 7 |
| 3 StÍF | 4 | 3 | - | 0 | - | 1 | 96 | 88 | 8 | 6 |
| 4 VÍF | 4 | 1 | - | 0 | - | 3 | 101 | 100 | 1 | 2 |
| 5 KÍF | 4 | 1 | - | 0 | - | 3 | 100 | 119 | -19 | 2 |
| 6 H71 | 4 | 0 | - | 0 | - | 4 | 93 | 115 | -22 | 0 |



**Peugeot 306, HDI**



- Árgangur: oktobur 1999.
- Koyrt: 68.000 km
- Motorur: TurboDiesel, 2 litur HDI
- Litur: myrkagrønt metallakk
- Eykaútgerð: Alufelgur (umframt vanligu felgurnar) og bakspoilara.
- Nýtir diesel og er sera bíligur í rakstri.

Til sølu um hóskandi boð fæst.

Meira kann fást at vita á **telefon 551503**




- men álvaratos, var tað hetta, tú ætlaði tær, Álvur?

At seta búgv er ikki bara sum at siga tað. Sjálvt eini smá hús kunnu kosta nógvan pening og í flestu førum merkir hetta, at tú bindur teg í mong ár.

Hví ikki byrja at spara saman nú? Byrjar tú í góðari tíð, kanst tú sleppa undan at taka stór lán, og tú fært betri ráð at vera í húsunum.

** Tú skalt vera fylt/ur 16 ár, um tú skalt stovna bústaðarkonto.*

Við Bústaðarkonto hevur tú møguleika at spara 240.000 kr. upp yvir 8 ár. Harumframt fært tú høga innlánsrentu frá bankanum, umframt 3% í rentustudningi frá landskassanum. Tað ger mun!

Les meira um Bústaðarkonto á www.foroyabanki.fo. Tú ert eisini vælkomin at seta teg í samband við starvsfólk bankans.

Vit geva tær betri ráð.

FØROYA BANKI

FA. GRAVSTEINAR




*Opið: mánadag - fríggjadag $9^{00}$-$17^{00}$ annars sambært avtalu.*

*Vøruskrá kann fáast!*



Vit gera gravarstaðin kláran til várið
Vit seta várleykir niður
Vit pynta gravarstaðin
við granni til jólar
Eisini seta vit ljós upp
til jólar og nýggjárs

**Ring í góðari tíð**

**Gravstaðar - røktin**
v/ Vagn Jákupsson í Geil
Tel: 226270
vg@post.olivant.fo
www.gravstadarroktin.fo

Kaj Andreasen & Co
Heilsøla • smásøla • umboð
Tel. 31 56 00 • www.andreasen.fo

**Termodrakt**

- Draktin til byggimeistarar, entreprenørar og sjómenn
- Luksus termodrakt.
- Bláar og svartar við endurskini

TILBOÐSPRÍSUR
**598,-**



Sosialurin 341800

veitst tú ikki tað?




**Skattalistin og Ársroknskapurin**
**hjá Runavíkar kommunu fyri 2002**

liggja frammi til alment eftirlit í tíðarskeiðnum frá 17. til 28. november 2003, báðir dagar íroknaðir.

**Runavíkar býráð**